# Løgmaður talaði á toppfundi

Kaj Leo Johannesen, løgmaður, hevur í dag hildið røðu á toppfundi millum norðurlendsku forsætisráðharrarnar og øðrum leiðandi politikkarum í Norðurlondum. Løgmaður kom inn á, hvussu heimurin er vorðin skakaður av fíggjarkreppuni, sum higartil hevur kostað ótaldar milliardir krónur. Tó helt hann, at fíggjarkreppan bert er ein av mongum kreppum í heiminum, sum eisini hevur veðurlagskreppu, matvørukreppu og ráevniskreppu. Felags fyri hesar kreppur og avbjóðingar er, at einstakar tjóðir hvør sær ikki kunnu loysa hesar kreppur. – Tað snýr seg um finna globalar loysnir, segði Kaj Leo Johannesen og ráddi til at savna norðurlendsku kreftirnar til at standa saman um loysnir. Á myndini sæst løgmaður saman við íslendska starvbróðuri sínum, Geir H. Haarde.





*Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnu- og tilfeingismálum*

*Mynd: Leo Poulsen*

# Breiðka ráðgevingina

**Ráðgevingin í fiskivinnumálum eigur at gerast betri og breiðari. Vit skulu eisini lurta eftir teimum, sum hava gingið í lívsins skúla, segði Jacob Vestergaard á landsfundi Fólkafloksins leygardagin**

**FISKIVINNA**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Landsstýrisfólk Fólkafloksins høvdu sínar framløgur eftir at Jørgen Niclasen, og Jacob Vestergaard, fiskivinnu- og tilfeingismálaráðharri, tosaði um tær ætlanir, sum liggja fyri framman.

Hann nam fyrst við ráðgevingina um serliga fiskidagar. Hann hevur áður ført fram, at vit eiga at fáa eina breiðari og gjølligari ráðgeving, og á landsfundinum leygardagin nevndi hann, at vit eiga at taka royndu fiskimenninar meiri við.

- Vit eiga at lurta eftir teimum, sum hava gingið í lívsins skúla alt sítt lív, fyri at fáa eina enn betri ráðgeving, segði Jacob Vestergaard.

Hann heldur eisini, at verandi skipan er ógvuliga stirvin, og at alt ov nógv skott eru inni í skipanini.

- Vinnan kann ikki í nóg stóran mun laga seg til broyttu umstøðurnar, segði Jacob Vestergaard.

Hann staðfesti, at tað er ein trupulleiki at fáa skipini mannað orsakað av vánaligum toskafiskiskapi. Oljuútreiðslurnar eru ógvuliga stórar, og tí hava trolararnir ilt við at klára seg.

- Smærru trolbátarnir hava tað ringt. Og 110 tons skottið, sum er inni í skipanini, er steinur oman á byrðu, og hetta er eitt mál, sum vit mugu taka upp, segði Jacob Vestergaard.

# Dømdur fyri datasvik

**Ein um 30 ára gamal maður varð í Føroya Rætti í gjár dømdur fyri at hava brúkt visakortið hjá mammu síni at upprætta ein profil hjá Danske Spil**




*Tann 30-ára gamli maðurin hevði brúkt visakortið hjá mammu síni til at upprætta ein profil hjá Danske Spil. Hann hevði í tveimum umførum brúkt tilsamans 2000 krónur*

*Modellmynd: Álvur Haraldsen*

**RÆTTARMÁL**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tey kundu lítið annað gera enn at trilla tumlar, ákærin og dómarin í Rættarsali II í gjár.

Fýra mál skuldu fyri, eitt um falska meldan, men tann ákærda í málinum hevði framman undan ringt og boðað frá, at hon ikki fekk møtt orsakað av veðrinum. Tí varð tað málið útsett.

Tann næsti, sum skuldi møta, kom ikki vegin fram, og tað gjørdu teir báðir síðstu heldur ikki. Men teir síðst nevndu vórðu bara burtur uttan nakra fráboðan, og tað fær avleiðingar.

Men aftur til tann eina, sum møtti í rættinum. Hann hevði ringt og boðað frá, at hann stóð fastur í kavanum, og tí gjørdist ov seinur. Hesi boðini komu tó ikki fram til ákæra og dómara fyrr en eftir, at ákærdi var møttur.

Ákæri og dómari fegnaðust í tí stilla um, at tað hóast alt bar til at avgreiða eitt mál av teimum fýra, sum skuldu fyri.

Talan var um ein 30 ára gamlan mann, sum hevði »lánt« kortnummarið á visakortinum hjá mammu síni og upprættað ein profil hjá Danske Spil AS.

Hetta var eyðsýniliga gjørt fyri at spæla við í eydnuspølum hjá donsku veddingarfyritøkuni, sum fyrr nevndist Dansk Tipstjeneste.

## Kostar handtøku

Men mamman vildi ikki góðtaka, at sonurin nýtti upplýsingar á hennara korti til at spæla fyri, so hon hevði gjørt Danske Spil vart við hetta, og danska veddingarfyritøkan hevur síðani stevnt soninum eftir teimum 2000 krónunum, sum teir nú hava mist.

Maðurin játtaði seg sekan og góðtók at gjalda peningin aftur umframt umsitingargjald á 250 krónur. Maðurin hevur áður framt líknandi brot, og tá fekk hann treytaðan dóm við royndartíð í tvey ár.

Men hóast royndartíðin ikki var runnin, tá maðurin framdi kortsvik tveir dagar í september í fjør, so varð málið ikki meldað fyrr enn royndartíðin var av.

Ákærin mælti tó til líknandi treytaðan dóm við tvey ára royndartíð, og hesum eftirlíkaði dómarin. Ákærdi góðtók dómin.

Hvat teimum báðum monnunum, sum ikki møttu á rættarfundi, viðvíkur, biður dómarin um handtøku. Tað fer fram á tann hátt, at tá nýggjur rættartfundur er ásettur, verður løgreglan send út at handtaka menninar, so dómsvaldið er víst í, at teir møta. Menninir fáa ikki hesaferð boð framman undan, men dómarin heldur seg hava varhugan av, at løgreglan í so máta tekur mundi fleiri fyrilit, enn danska løgreglan ger.

Ofta fáa menninir í slíkum førum boð frá løgregluni framman undan, so ikki er neyðugt at møta upp á arbeiðsplássum eftir teimum.

Báðir menninir eru ákærdir fyri at hava selt bilar eftir at fútarætturin hevur gjørt útlegg í teimum. Talan er um tvær ymiskar sakir kortini.